# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

2. mai fingu Annika Baldvinsson og Henrik Nielsen, Skals, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3510 gr.



*3 mai fekk Birgit eina lítlasystur, sum eitur Hanna. Hon vigaði 3800 g og var 52 cm long. Foreldrini hjá teimum eita Ann og Jens Jákup Hansen og búgva í Havn.*

6. mai fingu Jórun Mortensen og Niels Jespersen, Hov, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4200 gr.

8. mai fingu Margit og Eyðfinn Joensen, Porkeri, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2850 gr.

9. mai fingu Gunnrið Jóanesarson og Mortan Simonsen, Argjum, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3020 gr.

10. mai fingu Johild Poulsen og Sonni Mørk, Hvalba, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3680 gr.

10. mai fingu Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen, Signabø, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3750 gr.

10. mai fingu Judith og Jón Jacobsen, Eiði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

12. mai fingu Mona og Hanus Gregersen, Tórshavn, ein son. Hann var 59 cm langur og vigaði 4200 gr.

13. mai fingu Mariann Rasmussen, Glyvrar, og Regin í Hjøllum, Saltnes, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3500 gr.

## Andlát

7. mai
Asmund Olsen, Hósvík, 76 ár.
Sofus Joensen, Tórshavn, bús. á Tvøroyri, 70 ár
Rakul Biskopstøð, Klaksvík, 93 ár.

8. mai
Wenningsted Hansen, Skopun, 53 ár

10. mai
Tamar Samson, Klaksvík, 81 ár.

11. mai
Erhard Poulsen, Eiði, 82 ár

12. mai
Ola Hans Pauli Hansen, Svínoy, 90 ár.

13. mai
Gullbrand Simonsen, av Sandi, 75 ár.

## Rakul Biskopstø deyð

7. mai andaðist Rakul Biskopstø í Klaksvík, 93 ára gomul. Hon var ættað úr Fuglafirði og giftist í 1930 við Óla Hans Biskopstø úr Klaksvík, har tey búsettust. Tey seinastu árini var Rakul á Røktarheiminum í Klaksvík, og hon var klár til tað síðsta.

Eitt høvuðsstarv í lívi hennara var at ala børn upp, tí hon og Óla Hans fingu 9 børn, sum eisini fingu nógv børn, so eftirkomararnir eru nógvir í tali. Tey 9 børnini hjá Rakul og Óla Hans eru:

Julius varð føddur í 1930 og giftist í 1956 við Hallgerð Hansinu Joensen úr Fuglafirði. Tey búsettust á Biskupsstøð.

Hans varð føddur í 1932 og giftist við Henny Niclasen av Glyvrum. Tey búsettust í Havn.

Jónstein (kallaður Josh) varð føddur í 1933 og giftist í 1957 við Mariu Samson úr Klaksvík. Tey búsettust á Biskupsstøð. Hann doyði í 1964. Maria giftist uppaftur við Guttormi Klein frá Gjógv. Tey búgva í Klaksvík.

Petra varð født í 1935 og giftist við Janusi Gesti Ragnarsson. Tey búsettust á Neskeypsstaði.

Sverri varð føddur í 1936 og giftist í 1960 við Beintu Joensen úr Klaksvík. Tey búsettust í Havn.

Volmar varð føddur í 1938 og giftist við Tórhild Jensen úr Norðragøtu. Tey búsettust á Biskupsstøð.

Oddni varð føddur í 1942 og giftist í 1970 við Jóhonnu Elisabeth Mørkøre úr Klaksvík, har tey búsettust.

Sigrid varð fødd í 1946 og giftist við Napoleon Joensen úr Havn, har tey búsettust.

Yngstur er Karl Martin. Hann varð føddur í 1950 og giftist í 1976 við Juliu Kongsbakk úr Miðvági. Tey búsettust í Klaksvík.

Tað vóru sostatt 20 ár millum elsta og yngsta barnið hjá Rakul og Óla Hans.

## Andrea Hansen, Fuglafirði 80 ár 16. mai



Góða elskaða mamma, tillukku við áttatiáradegnum.

Mamma nú tú rundar tey áttati, má ásannast at tú hevur verið eitt arbeiðsgrev, tú hevur ikki spart teg. Mangan havi eg hugsa um tað stríð tú hevur havt av at uppala okkum 12 systkini. Men ongantíð merkti eg á tær at tú vart ónøgd við lut tín, tvørturímóti sá tað út sum at hesin barnaflokkur var tín lívs av-bjóðing. Eg merkti ongantíð at tú royndi at fáa okkum fram til lívsins hægstu og bestu størv. Men tað, sum var eitt og alt hjá tær var, at vit øll skuldu koma at kenna frelsaran frá Golgata, Jesus Kristus, tann stóra skapara og Harra, hvørs stórsligna náttúra, sum vit vóru umgird av hvønn dag, talaði um. Fjørðan við tí vakra sandinum, har havið, hvønn einasta dag, við sínum fleiri túsund tonsum broytti sandin og ánna til eitt stilt og friðfult spæli-pláss og so aftur til vakrar skúmandi hvítar aldur. Fjøllini stóðu so vøkur og litrík í sólskininum, og lokkaðu okkum niðan á Húsar, ella longur burtur, men so á vetrartíð, myrk og hóttandi niður yvir okkum í buldrandi ódn, eins og tey vildu taka okkum í sín náðileysa kalda hvassa slevjuta favn, táið hvirlurnar sugu luftina frá húsinum og síðani komu sum eitt sleggjuslag niður hinumegin. Húsini skulvu.

Góða mamma, um so vindurin blásti í útnyrðing ella láganlandnyrðing, um tað var ódn ella long, um tað var flóð ella fjørða, vart tú tann sama, og altíð á sama stað. Tú vart har. Barlastin sjálv. Tí gjørdist trivnaðurin so ómetaliga góður. Baklandið var i ordan. Øll náttúran var spælipláss okkara. Men, mamma títt lív og tín atferð skapti trivnað og samljóð í øllum hesum. Eg trúgvi at hetta, saman við Gudsótta tínum, gjørdi alt so ómetaligt lætt og einfald.

Hetta var loyndarmálið, kraftarkeldan.

Meg minnist frá heilt lítilum, at tú hvørt kvøld, tá tú legði okkum at sova, tókst tær tíð til "at takka við okkum" sum vit plagdu at siga. Tú takkaði Gudi og baðst eina bøn - ikki eina "ramsu," - men eina livandi bøn, hvørt kvøld. Meg minnist, at tú við tínum sterku og eymu hondum enn einaferð ballaði dýnuna væl rundan um meg og kysti meg. Eg kendi heita andadrátt tín og sovnaði so við tað sama.

Men so kom ein dagur.

Mamma góða, tú gjørdist sjúk - støðan var hættislig - meg minnist at doktarin kom og tú skuldi við hast fara á sjúkrahúsið. Teir komu við eini børu og løgdu teg á hana, og fóru berandi við tær oman trappurnar. Tá var fyri mær sum at alt skramblaði saman, eg krógvaði meg, græt í loyndum og kundi ikki sovnað.

Tað sum eg aldri hevði droymt um, hendi. Mamma var burtur. Alt myrknaði fyri mær. Óløgini løgdu seg miskunnarleys niður yvir mína óroyndu barnasál. Skipið fór á slavsíðu. Ballastin var burtur. Hvar skuldi eg venda mær.

Jú, tann góði Gud, sum tú hvørt kvøld hevði biðið til fyri mær, til Hansara vendi eg mær, í barnsligum áliti, at biða til, fyri tær. Hann, sum hoyrir bønir smábarna sína, sendi teg aftur í øllum góðum.

Skipið kom aftur á rættkjøl.

Góða mamma tú hevur ongantíð kraft samfelagið eftir nøkrum, tú kendi pláss títt "inni í heimi tínum" og ikki "uttanfyri." Tú hvørki rópti eftir vøggustovu ella barnagarði, nei lív títt hevur verið sermerkt av takksemi, nøgdsemi og fram um alt av Gudsótta. Friðsæla atferð tín hevur sett størri spor eftir seg enn mangar tómar buldrandi talur. Mamma, kæra fosturland okkara hevur fostra mangar góðar kvinnur, men tú ert hin besta. Hin besta.

Mamma eg kundi hildið á og skrivað eina heila bók um teg.

Nú tú fyllir áttati, kanst tú ikki reypa av at tú eigur nógv av heimsins virði, ognir og pening, men neyvan er nakar so ríkur sum tú, 12 børn, 12 svigarbørn og mong ommu- og langommubørn. Hetta er ikki bert ein rúgva av fólki, nei tú minnist tey øll við navni í bønum tínum og minnist eisini til hvønn einasta føðingardag.

Tú ert miðdepilin, samlingspunktið.

Hóast arbeiðsmegin tín ikki er tann sama, so er friðurin og takksemi ikki minni - men vónin er bjartari - til ein dag tú skalt fáa tína stóru løn frá Honum, sum tú í stilli og trúðfesti tænti her, Hann fer at siga: "Gott, tú góði og trúgvi tænari! Tú vart trúgvur yvir lítlum; eg skal seta teg yvir nógv."

Mamma vit hava ómetaliga nógv at takka tær fyri og gleða okkum til ein hugnaligan føðingardagin í kvøld.

Hendan heilsan er so bert ein lítil rósa frá mær.

Hjartaliga tillukku.

**xxxx**

# ítróttur

Nr. 93 • fríggjadagur • 16. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo




*Stóra veddingarkappingin hjá Kervinum og Sosialinum fer av bakkastokki um vikuskiftið*

# Dreymavedding

**Frá vikuskiftinum komandi og fram til endan av fótbóltslandskappingini fara teldufyritøkan, Kervi, og Sosialurin at skipa fyri stórari veddingarkapping**

DREYMAVEDDING
*Jákup Mørk*

Ímynda tær at hava eina heila millión, sum tú kanst spæla tær við, uttan at hugsa alt ov nógv um ringa samvitsku, um milliónin fer fyri skeyti.

Hetta er støðan, sum veddingarhugaði nú kunnu koma í, tí tað er ikki bara fótbóltslandskappingin, sum nú fer av bakkastokki.

Tað fer stóra dreymavedding-kappingin hjá Sosialinum og Kervinum eisini.

### Milliónin

Dreymavedding er eitt veddingarspæl á alnetinum, har tú kanst royna tína vitan og eydnu.

Tá ein hevur meldað seg til, og gjørt inngjaldingina, sum er eitt ómaksgjald uppá 100 kr, verða 1 millión spælikrónir settar á spælikontoina. Hesa millión kann ein so nýta til at gera veddimál við, og royna at vinna so nógvar pengar sum møguligt.

Tað eru ikki bert dystir úr føroysku kappingini, sum veddast kunnu um. Eins hjá eitt nú Dansk Tipstjeneste, er talan um dystir úr ymsum londum, formel 1, kurvabólt, kappróður o.m.a. teljast millum greinarnar, sum veddast kann um.

Sjálvur veddingarhátturin, er sera einfaldur. Alt eftir, hvussu stóran favoritt talan er um, verða odds sett á einstøku møguleikarnar, og hjá veddaranum er so bara at velja, hvat viðkomandi heldur vera mest sannlíkt. Eisini ber til at flætta fleiri veddingar saman, soleiðis at samlaða afturgjaldingin økist – men hinvegin eisini vandin fyri tapi.

### Fótbóltsferð

Og eingin kapping uttan vinningar. Høvuðsvinningurin til besta veddaran í 2003 verður ein fótbóltsferð út í Europa, og hartil vera eisini fleiri aðrir góðir vinningar. Eitt nú fáa bestu veddararnir hvønn mánaðin sær onkra virðisløn, eins og djarvasti veddarin eisini fær okkurt gott. Á heimasíðuni fer sjálvandi at bera til at fylgja við, hvussu einstøku luttakrarnir standa seg í kappingini, og hartil fer Sosialurin hvørja viku eisini at siga frá, hvussu støðan í kappingini er.

Fyri tey, sum vilja vera við alt fyri eitt, er at skunda sær inn á slóðina, http://dreymavedding.kervi.com, og tekna seg.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**
16.05 NSÍ-Skála Lassin Isaksen
16.05 HB-FSV Birgir Sondum
16.05 GÍ-KÍ Suni Johansen
16.05 VB-B36 Eiler Rasmussen
16.05 EB/S-B68 Páll Augustinussen

**2. deild menn**
17.05 B71-B36 Oddmar Andreasen
17.05 ÍF-B68 Tummas Pauli Olsen
17.05 VB-Sumba Rúni Gaardbo
17.05 KÍ-LÍF Regin Egholm
17.05 TB-AB Jens Petur Brattalíð

**3. deild menn**
18.05 NSÍ-Skála Jóannes Mikkelsen
18.05 HB-FSV Andrew Christiansen
18.05 GÍ-TB Jonhard Hansen
18.05 Royn-B36 Frits Poulsen
18.05 EB/S-ÍF Andreas Petur Hansen

**1. deild kvinnur**
16.05 EB/S-HB Jónleif Gerðisá
16.05 KÍ-GÍ Jan Gardar
16.05 B36-AB Ransin Djurhuus
16.05 FSV-B68 Emil Hentze

**Kappingin um Løgmanssteypið**
seinna hálvfinalan
(Støðan eftir fyrra dystin í klombrum)
18.05 GÍ-NSÍ (1-1) Birgir Sondum
18.05 KÍ-B36 (1-4) Páll Augustinussen

**Steypakappingin, kvinnur**
fyrra hálvfinalan
18.05 HB-AB Petur Skarðenni
18.05 KÍ-B36 Rúni Gaardbo

Í hálvfinalunum í steypakappingunum fer besta liðið yvir tveir dystir víðari. Stendur á jøvnum fer liðið við flest málum á útivølli víðari. Stendur framvegis á jøvnum verður talan um umdyst á 2X15 minuttir. Er framvegis eingin vinnari, verður sektasparkskapping.

## FM hóast verkfall

**Um vikuskiftið fara knappliga 300 børn at kappast í ymsum ítróttagreinum um sonevnda skúla-FM**

FRÆLSUR ÍTRÓTTU
*Jákup Mørk*

Ikki síðani Oyggjaleikirnar í 1989 hevur eitt somikið stórt tiltak innan frælsa ítróttin verið hildið í Føroyum. Tað er í øllum førum greitt, nú seinastu fyrireikingarnar til skúla-FM verða gjørdar.

Ikki færri enn 300 íðkarar úr øllum landinum fara leygardagin at kappast á Svangaskarði, har fyrstu kappingarnar fara av barkastokki longu klokkan tíggju, og síðani verður hildið á mest sum út í eitt fram til klokkan sjey á kvøldið, tá hin seinasta av teimum 80 kappingunum er liðug. Heiðursmerkjahandan til bestu íðkararnar fer fram so hvørt, sum kappingarnar eru lidnar.

Fyriskipararnir heita annars á luttakararnar at møta í góðari tíð, so handan av startnummurum og aðrar fyrireikingar kunnu greiðast sum best, og hartil verður eisini boðað frá, at tað ivaleyst er gott, um ein góður matpakki verður við í skjáttuni, tí talan verður ivaleyst um ein av teimum strævnu døgunum.